# SKRÁ

## DAGUR 1 | 18. juni 2018

*Grundleggjandi um FBP (Financial Business Partner) hugtakið og starvið.*
*Hvat er ein FBPí roynd og veru?*

- Hugtakið business partner í bæði almennum og privatum organisatiónum – í einum søguligum høpi
- Lýsing og avmarking av starvinum FBP (strategisk, operationel controlling)
- Innleiðsla til meginuppgávur og lutaruppgávur hjá FBP

*Fíggjarstýringshugtøk – eitt nú hvussu tú setir mál og røkkur teimum*

- Fáa greiðu á hugtakinum mál- og úrslitastýring
- Hví mál- og úrslitastýring?
- Frá strategi til mál og mátingar
- Hvussu setir tú mál sum viðkomandi mál, sum kunnu setast í verk, og sum eru viðkomandi fyri alt arbeiðsplássið?
- Shareholder value – hvussu verður tað skapt? CAPEX, OPEX, ROI o.s.fr.

*Controllarin sum Financial Business Partner*

- Skil, hvat tað er, sum kundin/viðskiftafólkið hjá tær hevur áhuga í
- Fá amboð til at stuðla tínum kundum/viðskiftafólkum í at taka avgerðir
- Frá ”number crunching” til financial business controlling

## DAGUR 2 | 19. juni 2018

*Váðastýring og innanhýsis eftirlit*

- Lýsing av innanhýsis eftirliti og váðastýring, herundir roknskapar-leiðbeiningar
- Risk Management-frymilin DS484 við lutum úr COSO-modellinum
- Nýtsla av innanhýsis eftirliti og váðastýringsskipanini – máting, greining og menning av mannagongdum
- Eftirmeting av innanhýsis eftirliti og váðastýringsskipanini – hvat skal til?
- Leikluturin og ábyrgdin hjá FBP í mun til eftirlit og váðastýring
- Samanspæl við uttanhýsis eftirlit (ríkis-/ og innanhýsis grannskoðan)

*Frá útreiðslustýring til at stýra kostnaðinum við amboðnum Activity Based Costing Management*

- Innlit í skipanina, ið lýsir tilfeingisnýtsluna til ymiskt virksemi
- Lær eina metodu til at áseta prísin á internum og eksternum veitingum
- Benchmarking tvørtur um deildir, størv og feløg/stovnar
- Set í verk ella menn eitt felags mál tvørtur um størv og feløg/stovnar

*Sáttmálastýring og FBP:*

- Hvat er sáttmálastýring og controlling?
- Hvat er sáttmálastýring og -controlling?
- Menning av konseptinum (frá rammustýring til úrslitastýring)
- Sáttmálastýring – framløga av teimum ávísu amboðunum
- Samanhangurin millum stýringsamboðini (sáttmálastýringsketan)

## DAGUR 3 | 20. juni 2018

*Financial Business Partnermodell fyri rapportering: Leiðslurapportering og informatiónsstýring – mál og krøv um úrslit:*

- Leiðslukunningarskipanir, um hvussu hesar verða brúktar og rótfestar í fyritøkuni/stovninum. Eitt nú hesar skipanir: EFQM, BPR, VBM, EVA™ og ABC/M
- Um Balanced Scorecard (BSC) sum leiðsluteknologi
- BSC sum innanhýsis leiðslukunningarskipan, eitt nú samanhangurin millum orsøk og ávirkan
- Vit menna Balance Scorecard í plenum, har vit tjakast um treytirnar fyri at velja KSF'arar og KPI'arar

## DAGUR 4 | 21. juni 2018

*Stýring av broytingum á stovninum/fyritøkuni*

- Seta broytingar í verk
- Reaktiónir upp á broytingar
- Force-field greining og at skilja trupulleikar (grundreglur fyri broytingar)
- Tann góði broytingaragenturin (forandringsagent)

*At hugsa um, tá tit ætla at uppræetta eitt starv sum FBP – mál, endamál og organisering:*

- Tað fyrsta, tit skulu hugsa um
- Kortlegging og meting av faktorum
- Hvar skal FBP-starvið vera plaserað?
- Munurin á FBP-starvið og controllerstarvið
- Lýsing av leiklutum og uppgávum

## DAGUR 4 | 21. juni 2018

*Væntanir til Financial Business Partner-funktiónina*

- Kortleggjan av, hvat tit vænta av tykkara Financial Business Partnara
- Kortleggjan av innanhýsis og uttanhýsis kundum/viðskiftafólkum (stjórar, leiðarar, starvsfólk, revisión o.s.fr.)
- Kortleggjan av egnum leikluti í mun til, hvat ymiskir kundar/viðskiftafólk vænta
- Kortleggjan og avmarking av uppgávum, og hvør kann lata uppgávur
- Raðfesta arbeiðsuppgávur og gera eina tíðarætlan og virkisætlan

*Tú sum controllari, coach, innovator og sparringspartnari*

- Avklároring av leiklutum og funktiónum
- Hvussu byggja vit klientsambond?
- Handfaring av broytingum
- "Bleytir" førleikar, sum ein góður FBP eigur at hava
- Brúka broytingarstrategiirnar sum ráðgevandi Financial Business Partnari
- Vitan um amboð og konsept, sum kunnu vera partur av broytingar-tilgongdum
- Handfaring av ósemjum

## Dagur 5 | 22. juni 2018 | Próvtøka valfrítt*

Tá undirvísingin er liðug er møguligt at fara til eina 3 tíma próvtøku. Talan er um eina fleirvalspróvtøku (multiple choice) umframt eina miniuppgávu, sum tú kanst standa/ikki standa. T.v.s. at karakterur ikki verður givin. Aftaná próvtøkuna, fært tú eitt prógv. Ynskir tú ikki at fara upp til próvtøku, fært tú eina skeiðsváttan um, at tú hevur luttikið, men ikki verið til próvtøku.

*Møguleiki er eisini at fáa próvtøkuspurningarnar heim við. Tá skal próvtø-kan verða svarað í seinasta lagi 30. juni 2018. Hesin leistur verður nýttur í DK og í Grønlandi. Vit hava bara valt at lata luttakararnar velja, um teir ynskja at koma til próvtøkudagin tann 22. juni 2018 og fáa próvtøkuna avgreidda, ella um teir ynskja at lata próvtøkuspurningarnar inn 30. juni 2018.